Teitur aftur til USA

Teitur hevur næstu vikurnar eina ørgrynnu av konsertum í USA

Føroyski tónleikarin Teitur Lassen hevur nú lagt leiðina aftur til Norðuramerika, har hann skal spæla nógv næstu tíðina.

Teitur hevur seinastu vikurnar verið í Europa og spælt, og umframt framførslur í Norðurlondum, hevur hann eisini spælt í Hollandi og í Onglandi.

Teitur hevði fleiri konsertir í Danmark, og har vóru nógvir føroyingar og lýddu á. Men tað vóru ikki bara landsmenn hjá Teiti, sum vildu sleppa at hoyra hann, tí áhugin fyri tónleikin hjá honum er vaksandi allastaðni.

Teitur hevur onkrar framførslur í Kanada í hesi vikuni, og síðani skal hann spæla mest sum hvønn dag komandi mánaðin ymsastaðni í USA.

Teitur kemur aftur til Føroya seinni í ár, og tá skal hann spæla á Listastevnuni.

I AM savnar orku

I AM liggur eitt sindur í dvala í løtuni, men rockbólkurin kemur sterkt aftur í summar

Føroysku gospelbólkurin I AM var nógv frammi fyri jól, tá ið teir spældu til nógvar konsertir og góvu fløgu út. Bólkurin hevði rættiligan undanvind við fløgusøluni, og eisini á palli tóktist bólkurin verða betri upplagdur enn nakrantíð áður.

Seinastu mánaðirnar hevur ikki verið nógv at hoyrt til I AM, men tað er bara stille før stormen.

Sangarin í bólkinum, Birgir Sigurðsson, er á skúla í Danmark, og tað avmarkar eitt sindur, hvussu nógv bólkurin kann spæla.

Men í summar fer I AM aftur í gongd við konsertframførslur. Bólkurin ætlar sær at spæla í Føroyum, men møguliga verður eisini onkur uppgáva uttanlands. Bólkurin hevur áður sagt alment, at teir royna at sleppa fram at til tiltøk uttan fyri landoddarnar, og okkurt bendir á, at teir fara at fáa onkra uppgávu.

whazzzup!!!

Forrige | Næste | Svar | Svar alle | Videresend | Flag | Udskriv | Rediger | Slet | Ombryd igen | Udkast

TELDUBRÆVIÐ

Frá: Stefan í Skorini, skorini@gjk.dk
Til: post@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

Vandamikið demokrati

"Einki er so vandamikið og destabiliserandi í einum landi við sterkum etniskum spenningum sum demokrati"

Nakað soleiðis orðaði ein serfrøðingur í altjóða viðurskiftum við Københavns Universitet seg. Undirritaði var eitt kvøldi til pallborðsfund, har evnið var støðan í Irak, og fleiri serfrøðingar á økinum gjørdu sínar viðmerkingar.

Hvørja ferð George Bush, Tony Blair og teirra samsintu eru í fjølmiðlunum og gera viðmerkingar til støðuna í Irak, leggja teir dent á, at Irak skal gerast ein framkomin og demokratiskur statur í Miðeystri. Landið skal vera ein viti í økinum, sum skal vísa øllum hinum londunum á rætta leið.

Demokrati er svarið uppá allar heimsins trupulleikar. Um vit bara innføra demokrati allastaðni, verður alt so sára gott.

Tað, sum omanfyrinevndi serfrøðingur roynir at vísa á, er, at tað ikki altíð ber til at demokratisera eitt land uttan stórvegis hóvasták. Shia-muslimarnir krevja sjálvandi fult sjálvstýri, og at demokratisk val skulu fyriskipast beinanvegin. Á henda hátt kunnu teir tryggja sær meirilutan og harvið valdið í landinum. Hetta hóvar sjálvsagt ikki sunni-minnilutanum og kurdunum norðanfyri, sum ikki vilja finna seg í at verða stýrd av shia-muslimunum, og tað kann elva til stríð millum fólkabólkarnar. Rwanda og Jugoslavia eru tvey ræðandi dømir um slíkt í nýggjari tíð.

Vandin er, at landið flytur seg frá einarræði undir Saddam Hussein til eitt fleirtalsdiktatur, har shia-muslimarnir, sum telja 62 % av fólkinum, fara at kúga minnilutarnar.

Demokrati er sjálvandi tað mest ynskiliga, men tað er ikki í øllum londum, at hetta letur seg so væl gera.

Tað sæst eisini longu nú, at tað vera prestarnir, sum fara at hava ein týðandi leiklut framyvir. Demokrati viðførir sostatt ein stat knýttan at religiónini, har sekularisering er ein býur í Sibiria. Ein beinleiðis avleiðing av hesi "desekularisering" er eitt nú, at kvinnur í Irak hava fingið verri rættindir í samband við hjúnaskilnað enn áður. Soleiðis virkar demokratiið í Irak.

Endamálið við hesum teldubrævinum er bert at vísa á nakrar trupulleikar, sum fólk sjáldan geva sær far um, og ikki at fortelja tykkum, hvussu ókomni knúturin kann loysast beint her og nú.

Nýtt Føroyskt Tógv

Vaskað í noðum og óvaskað á spola í 6 ymiskum náttúrulitum í 2 tráðaðum fínum, 2 tráðaðum og 3 tráðaðum

Tógvið er at fáa í hesum handlum kring landið:

NORÐOYGGJAR
Norðoya Heimavirki, *Klaksvík*
Hjá Vimu, *Klaksvík*
Búnin, *Klaksvík*
Handilin, *Norðdepil*
Brúgvaskifti, *Viðareiðið*

EYSTUROY
Josi, *Skála*
Inn, *Norðskála*
Toystovan, *Fuglafjørður*
Karl Hansen, *Leirvík*
Eysturoyar Heimavirki, *Saltangará*
Navia, *Toftir*

VÁGAR
Valdemar A. Simonsen, *Sørvágur*
Kristianshús, *Mykines*
Prýði, *flogvøllurin, Sørvágur*

STREYMOY
Seymibúðin Eldina, *Haldarsvík*
Kjalnesbúðin, *Kollafjørður*
Hjá Palla, *Vestmanna*
Fandango, *Tórshavn*
Igloo, *Tórshavn*
Vilma, *Tórshavn*
Bindibúðin, *Tórshavn*
Hans Iversen, *Kvívík*
Gabriel, *Nólsoy*

SANDOY
Búrhandilin, *Skopun*
Ellubitin, *Sandur*
Handilin, *Skúvoy*

SUÐUROY
N. P. Nónstein, *Hvalba*
Tóbúðin, *Tvaroyri*
Zacharias Müller, *Porkeri*
Suðuroyar Heimavirki, *Vágur*

MYNSTURKAPPING

Bindibúðin í SMS og Navia útskriva mynsturkapping.

Í samband við, at nýggja føroyska Navia-tógvið kemur á marknaðin, er ætlanin at geva út eina bindibók. Mynstrini verða útvald úr teimum pløggum, sum koma inn til kappingina.

Krøv til luttakarar í mynsturkappingini
- Mynstrini skulu vera nýskapandi og úr tógvi frá Navia
- Mynstrini kunnu bæði vera til børn og vaksin
- Rættindini til mynstrini verða latin Navia og Bindibúðini.
- Luttakararnir skulu eisini í stuttum lýsa hvussu plaggið varð bundið, og hvussu nógv tógv fór í plaggið.

Vinningar
Høvuðsvinningur; 5.000 kr.

Eisini verða vinningar latnir øllum sniðgevarum, sum koma við í bindibókini.

Innlatingarfreistin er fríggjadagin 25. juni. Latast inn til Bindibúðina í SMS ella Navia á Toftum.

Um tygum hava spurningar viðvíkjandi hesum, setið tygum í samband við Navia ella Bindibúðina.

navia

Postsmoga 42 FO-650 Toftir Føroyar
Tel. 449282 Fartel. 219482 Fax 449281
navia@navia.fo

W63T457171

Skrivstovufólk

Royndarstøðin á Búnaðardeplinum í Kollafirði søkir eftir skrivstovufólki til fjølbroytt arbeiði.
20 fólk arbeiða á deplinum í fríum umhvørvi.

Arbeiðið kemur m.a. at fevna um:
- Arbeiði við roknskaparskjølum
- Skriving av frágreiðingum
- Brævaskriving
- Arkivering

Førleikakrøv:
- Góðan kunnleika innan føroyska rættskriving
- Royndir innan tekstviðgerð og rokniark á teldu
- Góð samstarvsevni
- Royndir frá líknandi starvi

Løn sambært sáttmála við starvsmannafelagið

Arbeiðstíð: Uml. 20 tímar um vikuna býttir á 3-4 dagar millum kl. 08.00 og 16.00.

Nærri upplýsingar um starvið
fáast frá Peder Haahr tlf. 479002 ella 479003

Umsókn
Skrivlig umsókn skal vera Royndarstøðini í hendi í seinasta lagi 16. mai 2004.

Royndarstøðin
Búnaðardepilin · 410 Kollafjørður

Trukkskeið

byrjar mánadagin 26. apríl kl. 19.15.

Tilmelding á **tlf. 318821** ella **218777.**

Sp/f Koyrikortið
v/ Hans J. Hermansen
Slættanesgota 5

Bóndur – fyritøkur!

Góðkenning av vistfrøðiligum úrdráttum í Føroyum

Ert tú áhugaður í at vera millum tey fremstu innan umhvørvisvinarliga framleiðslu? Um so er kann vistfrøðilig góðkenning koma til gagns fyri teg.

MBM fyrireikar fyrstu metingarnar í samstarvi við góðkenningarstovnin TÚN. Í døgunum 26/4 til 3/5 er møguligt at fáa óbindnandi vitjan og meting av viðurskiftunum.

Upplýsingar og bílegging á tlf. 216026

Bjørn Patursson

Handilslærlingur
til Teymavirkið í Runavík

Teymavirkið P/f í Runavík sóknast eftir handilslærlingi at byrja skjótast møguligt.

Vit bjóða eitt starv á einum fjølbroyttum arbeiðsplássi í støðugari menning, har samstarv við arbeiðsfelagar, veitarar og kundar er av alstórum týdningi.

Vit vænta, at tú ert fyrikomandi og arbeiðssamur persónur, sum eisini kann arbeiða sjálvstøðugt. Og at tú hevur hug og áræði at gerast partur av okkara arbeiðsdegi, sum við hvørt er eitt sindur strævin, men hóast tað stuttligur.

Umsókn við avriti av prógvum, møguligum ummælum og CV skulu verða Teymavirkinum, Boks 210, 620 Runavík, í hendi í seinasta lagi leygardagin 1. mai 2004.

Meiri fæst at vita við at venda sær til Eyðvør Berg á tlf. 473 000.

TEYMAVIRKIÐ

Teymavirkið í Runavík og Snørisvirkið í Klaksvík eru einastu fyritøkur í Føroyum, ið framleiða línu, teymar og togverk. Bæði virkini hava skipshandlar, har m.a. arbeiðsklæði og trygdarútgerð er at fáa. Harafturat hevur Teymavirkið búnýtis- og klædnadeild. Í alt eru 20 fólk í starvi hjá Teymavirkinum og Snørisvirkinum.